# FREMMANDAMÁL Í FØROYSKA SKÚLAVERKINUM

**Tilmæli**

28. oktobur 2021

# Innihaldsyvirlit

1. Inngangur ... 2
2. Arbeiðssetningur ... 3
3. Arbeiðsgongd ... 4
3.1. Viðmerkingar til innkomnu hoyringssvarini ... 4
4. Yvirlit yvir tilmælini ... 5
4.1. Tíma- og lærugreinabýti ... 5
4.2. Námsætlanir ... 5
4.3. Undirvísingartilfar og læraraførleikar ... 5
4.4. Gransking og útbúgving ... 6
4.5. Atgerðir og kostnaðir ... 6
5. Viðmerkingar til tilmælini ... 7
5.1. Viðmerkingar til tíma- og lærugreinabýti ... 7
5.2. Viðmerkingar til námsætlanir ... 9
5.3. Viðmerkingar til undirvísingartilfar og læraraførleikar ... 10
5.4. Viðmerkingar til gransking og útbúgving ... 12

# 1. Inngangur

Landsstýrismaðurin í uttanríkis- og mentamálum, Jenis av Rana, setti í januarmánaði í 2021 ein arbeiðsbólk at gera uppskot til ítøkiligar tillagingar í fólkaskúla og á miðnámi, sum hava til endamáls at styrkja støðuna hjá fremmandamálum í føroyska skúlaverkinum. Arbeiðsbólkurin var mannaður við seks fólkum. Landsstýrismaðurin valdi sjálvur tríggjar limir, og Føroya Lærarafelag, Yrkisfelagið Miðnám og Fróðskaparsetur Føroya valdu hvør sín lim.

Arbeiðsbólkurin:

Hanna Ziskason Hansen, fulltrúi í Uttanríkis- og mentamálaráðnum, forkvinna.

Sólvá Jónsdóttir, námsráðgevi í Námi, skrivari.

Mortan Zachariassen, fulltrúi í Undirvísingarstýrinum.

Tórhallur við Gil, fólkaskúlalærari, umboðandi Føroya Lærarafelag.

Hanna Jensen, miðnámsskúlalærari, umboðandi Yrkisfelagið Miðnám.

Kalpana Vijayavarathan, adjunktur, umboðandi Fróðskaparsetur Føroya.

Tilnevningarskriv varð latið limunum á fyrsta fundinum, sum varð hildin í Uttanríkis- og mentamálaráðnum 19. januar 2021.

## 2. Arbeiðssetningur

*Landsstýrismaðurin hevur avgjørt at seta ein arbeiðsbólk at gera uppskot til ítøkiligar tillagingar í fólkaskúla og á miðnámi, sum hava til endamáls at styrkja støðuna hjá fremmandamálum í føroyska skúlaverkinum.*

*Talan er um at gera uppskot til ítøkiligar broytingar til dømis í sambandi við:*

- *raðfesting av mállærugreinum*
- *samlaða kravið til tímatal og býti av hesum*
- *valmøguleikar*
- *annað*

*Umframt at hyggja eftir, hvussu fremmandamál eru raðfest í skúlaskipanini í okkara grannalondum, kann arbeiðsbólkurin nýta áður gjørd tilmæli sum íblástur. Eisini verður heitt á arbeiðsbólkin at skipa so fyri, at áhugaðir partar hava møguleika fyri at vera hoyrdir, áðrenn endaligt tilmæli verður latið landsstýrismanninum.*

# 3. Arbeiðsgongd

Arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt arbeiðssetningin á til samans átta fundum, og tilmælini byggja á áður gjørdu tilmæli:

- *Eftirmeting av breytaskipanini – septembur 2018*
- *Tilmæli til framtíðarætlan fyri fremmandamál í føroyska undirvísingarverkinum – juli 2019*
- *Uppskot um ítøkiligar skipanarligar broytingar á tveimum økjum í gymnasialu breytaskipanini – desembur 2019*

Tilmælini hava verið til hoyringar hjá hesum pørtum:

- Føroya Lærarafelag
- Yrkisfelagnum Miðnámi
- Fróðskaparsetri Føroya
- Føroya Tekniska Lærarafelag
- Undirvísingarstýrinum
- Námi
- Fólkaskúlaráðnum

## 3.1. Viðmerkingar til innkomnu hoyringssvarini

Í arbeiðssetninginum er ásett, at bólkurin skal gera uppskot til ítøkiligar broytingar við tí endamáli at *styrkja* støðuna hjá fremmandamálum í føroyska skúlaverkinum. Við støði í arbeiðssetninginum og innkomnu hoyringssvarunum eru tilmælini viðgjørd av nýggjum og tillagað nakað. M.a. varð tilmælið at seta týskt í trý ár í fólkaskúla sum upptøkukrav til búskaparbreyt á miðnámi strikað.

Full semja var ikki í arbeiðsbólkinum um at strika hetta kravið. Bæði fyrimunir og vansar høvdu verið við týskum sum upptøkukravi til búskaparbreyt. Av fyrimunum kunnu nevnast, at búskaparbreytin við einum upptøkukravi hevði verið meira javnstillað við hinar 3-ára gymnasialu breytirnar, sum allar hava antin týskt ella alis- og evnafrøði sum upptøkukrav. Eitt tílíkt krav hevði eisini styrkt um fremmandamál í føroyska skúlaverkinum, bæði við at fleiri óivað høvdu valt týskt í fólkaskúlanum, og at næmingar í búskaparbreyt høvdu kunnað valt týskt sum framhaldsmál. Búskaparbreyt er tó í fakligum innihaldi meira sambærilig við tøknibreyt og tilfeingisbreyt, sum ikki hava týskt sum upptøkukrav. Hesar breytir eru meira vinnurættaðar enn hugbreyt og náttúrubreyt, og flestu breytarlærugreinarnar eru nýggjar lærugreinar, sum næmingarnir ikki hava havt í fólkaskúlanum. Øll eru ikki á einum máli um, at týsklærugreinin hevði lagt nóg nógv aftur at kjarnuførleikunum, sum eyðkenna búskaparbreyt.

# 4. Yvirlit yvir tilmælini

Tilmælini fevna um fýra høvuðsøki:

- Tíma- og lærugreinabýti
- Námsætlanir
- Undirvísingartilfar og læraraførleikar
- Gransking og útbúgving

## 4.1. Tíma- og lærugreinabýti

- Týskt verður lærugrein í 7. flokki við tveimum tímum um vikuna. Tímar verða fluttir í skipanini, soleiðis at samlaða tímatalið í týskum og samlaða tímatalið í 7. flokki verða óbroytt.
- Á miðnámi verður á náttúrubreyt og búskaparbreyt krav um eitt fremmandamál á B-stigi aftur at enskum *ella* danskt á A-stigi.
- Týskt sum byrjanarmál á miðnámi verður strikað.

## 4.2. Námsætlanir

- Námsætlanin í donskum frá 3. floksstigi til A-stig skal dagførast, og vegleiðing skal gerast. Meira dentur skal leggjast á málið sum miðil og samskiftisamboð, eisini í grannamálunum norskum og svenskum.
- Námsætlanin í enskum frá 4. floksstigi til A-stig skal dagførast, og vegleiðing skal gerast. Meira dentur skal leggjast á málið sum miðil og samskiftisamboð, bæði í enskmæltum londum og í enskum sum lingua franca kring heimin.
- Námsætlanin í týskum skal dagførast, og vegleiðing skal gerast. Námsætlanin skal fevna frá 7. floksstigi í fólkaskúla til A-stig á miðnámi. Meira dentur skal leggjast á málið sum miðil og samskiftisamboð, herímillum skal námsætlanin lagast meira til CEFR-skipanina.
- Námsætlanirnar í fronskum og sponskum skulu dagførast, og vegleiðingar skulu gerast. Meira dentur skal leggjast á málini sum miðil og samskiftisamboð, herímillum skulu námsætlanirnar lagast meira til CEFR-skipanina.

## 4.3. Undirvísingartilfar og læraraførleikar

- Dagført, føroyskt undirvísingartilfar í fremmandamálunum í fólkaskúlanum skal fáast til vega.
- Dagført, føroyskt undirvísingartilfar í fremmandamálunum á miðnámi skal fáast til vega.
- Námsráðgevi í týskum á fólkaskúlaøkinum skal setast í starv.
- Námsráðgevar í fremmandamálum á miðnámsskúlaøkinum skulu setast í starv.
- Skipast skal fyri skeiðum í fremmandamálsdidaktikki á fólkaskúlaøkinum.
- Skipast skal fyri skeiðum í fremmandamálsdidaktikki á miðnámsskúlaøkinum.

## 4.4. Gransking og útbúgving

- Námsvísindadeildin á Fróðskaparsetri Føroya skal hava granskingarstørv í øllum fremmandamálum, sum eru lærugreinar í føroyska fólkaskúlanum. Nýggj fulltíðar granskingarstørv skulu tí skipast til lærugreinarnar danskt og týskt.
- Á Fróðskaparsetri Føroya skal arbeiðast fram ímóti, at miðnámsskúlalærarar í fremmandamálum skulu kunnu útbúgva seg í minsta lagi á bachelorstigi í Føroyum.

## 4.5. Atgerðir og kostnaðir

Stutt yvirlit yvir atgerðir og kostnaðir. Útgreining er í parti 5.

**Broytingar skulu gerast í hesum lógum og kunngerðum:**

- Fólkaskúlalógini (Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997)
- Undirvísingarkunngerðini (Kunngerð nr. 9 frá 22. januar 2013)

**Kostnaður:**

- Øking í samlaða kravda tímakarminum á náttúrubreyt og búskaparbreyt á miðnámi.

**Nám skal raðfesta fremmandamálini, herímillum:**

- Seta í starv námsráðgevar
- Dagføra námsætlanir
- Útgeva undirvísingartilfar
- Skipa skeið í fremmandamálsdidaktikki

**Kostnaður:**

- Játtanin til Nám skal økjast við uml. 800.000 kr. árliga til námsráðgevar.
- Játtanin til Nám skal økjast við uml. 1.200.000 kr. árliga í trý ár til verkætlanarsettar ritstjórar.

**Fróðskaparsetur Føroya skal raðfesta fremmandamál:**

- Skipa føst granskingarstørv á Námsvísindadeildini í donskum og týskum.
- Fyrireika útbúgvingar í minsta lagi á bachelorstigi til miðnámsskúlalærarar í fremmandamálum.

**Kostnaður:**

- Játtanin til Fróðskaparsetur Føroya skal økjast við uml. 1.200.000 kr. árliga.

# 5. Viðmerkingar til tilmælini

Mælt verður til, at tilmælini verða sett í gildi skjótast gjørligt.

## 5.1. Viðmerkingar til tíma- og lærugreinabýti

- *Týskt verður lærugrein í 7. flokki við tveimum tímum um vikuna. Tímar verða fluttir í skipanini, soleiðis at samlaða tímatalið í týskum og samlaða tímatalið í 7. flokki verða óbroytt.*

Næmingarnir í fólkaskúlanum læra danskt frá 3. flokki og enskt frá 4. flokki. Tað er óheppið, at ov long tíð gongur, til teir læra næsta fremmandamál ella einki nýtt mál læra yvirhøvur eftir 4. flokk. Hóskandi hevði verið at lært eitt nýtt fremmandamál í 7. flokki fyri at halda førleikan at ogna sær mál við líka.

Sambært §5. stk. 4 í fólkaskúlalógini skal týskt (ella annað fremmandamál) standa næmingunum í boði í 8. og 9. flokki. Mælt verður til at byrja longu í 7. flokki við tveimum tímum um vikuna í týskum, so at allir næmingar kunnu hava týskt. Eftir hetta kunnu næmingarnir velja, um teir halda fram við týskum í 8. og 9. flokki við trimum tímum um vikuna hvørt árið. Við hesum verður týskt javnsett við lærugreinina alis- og evnafrøði í fólkaskúlanum. Tímatalvan í fólkaskúlanum er rættiliga full, og tí er ætlanin ikki at økja um tímatalið, men heldur at flyta nakrar tímar, so samlaða tímatalið í týskum og samlaða tímatalið í 7. flokki verða óbroytt.

| | |
|---|---|
| **Atgerð:** | Broyting í fólkaskúlalógini (Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997) |
| **Kostnaður:** | Eingin |

- *Á miðnámi verður á náttúrubreyt og búskaparbreyt krav um eitt fremmandamál á B-stigi aftur at enskum ella danskt á A-stigi.* [1]

Í tilmælinum til framtíðarætlan fyri fremmandamál í føroyska undirvísingarverkinum frá juli 2019 verður víst á týdningin av at læra fremmandamál, og í uppskotinum um ítøkiligar skipanarligar broytingar á tveimum økjum í gymnasialu breytaskipanini frá desember 2019 er ítøkiligt uppskot um, hvussu skipanin kann tillagast soleiðis, at allir næmingar á hugbreyt, náttúrubreyt, búskaparbreyt og fyrireikingarbreyt fáa eitt fremmandamál á B-stigi aftur at enskum *ella* danskt á A-stigi. Uppskotið byggir á, at samlaði tímakarmurin verður hækkaður, soleiðis at hann er á sama støði sum í Danmark. Samlaði karmurin fyri útbúgvingartíð á náttúrubreyt og búskaparbreyt er í dag í minsta lagi 2.470 klokkutímar og í mesta lagi umleið 2.600 tímar. Karmurin eigur at verða hækkaður

[1] Næmingar, sum ikki hava føroyskt sum fyrsta mál og danskt sum annað mál, eiga tó at kunna søkja um undantak frá hesum. Tað kann verða ov møtimikið hjá teimum at skula læra fleiri mál, samstundis sum tey skulu menna føroyska málið sum annaðmál. Tey hava eisini aðrar málførleikar frammanundan, sum skulu koma teimum til góðar. Tey kunnu ístaðin velja aðra lærugrein á B-stigi, t.d. mentanarfatan, ella fáa førleikamett og góðskrivað egið móðurmál í staðin fyri eitt fremmandamál á B-stigi.

til 2.600 sum minsta mark. Eitt eyka mál á B-stigi[2] krevur 200 tímar til samans í tvey ár. Um karmurin verður hækkaður, sum nevnt er omanfyri, ber til at seta krav um eitt fremmandamál afturat. Hetta kann gjøgnumførast, sum lýst er niðanfyri:

**Náttúrubreyt**. Kravið um, at antin evnafrøði ella lívfrøði skal veljast frá C til B (§9,3 – 125 tímar) verður strikað. Í staðin verður sett krav um eitt byrjanarmál ella framhaldsmál á B-stigi aftur at enskum *ella* danskt á A-stigi (200 tímar). Næmingar hava framvegis møguleika at velja bæði evnafrøði og lívfrøði, annað sum kravda felags- ella breytarlærugrein og hitt sum frítt val á breytini. Náttúrubreyt hevur, sum er, millum 195 og 325 tímar til frítt val. Um karmurin verður hækkaður sum nevnt, hevur náttúrubreyt í minsta lagi 250 tímar til frítt val, eftir at kravda mállærugreinin er tald við.

**Búskaparbreyt**. Ein felagslærugrein ella frí vallærugrein C til B (§ 6,4 - 125 tímar) verður skift út við krav um eitt byrjanarmál ella framhaldsmál á B-stigi aftur at enskum *ella* danskt á A-stigi (200 tímar). Í verandi tímakarmi hevur búskaparbreyt millum 285 og 415 tímar til frítt val. Um karmurin verður hækkaður sum nevnt, hevur búskaparbreyt í minsta lagi 340 tímar til frítt val, eftir at kravda mállærugreinin er tald við.

**Hugbreyt og fyrireikingarbreyt**. Krav er longu um tvey mál aftur at enskum. Tí er ikki neyðugt við tillaging á hesum breytunum fyri at uppfylla kravið um eitt fremmandamál aftur at enskum. Karmurin á hugbreyt eigur tó at hækka og vera tann sami sum á búskaparbreyt og náttúrubreyt.

**Atgerð:** Broyting í undirvísingarkunngerðini (Kunngerð nr. 9 frá 22. januar 2013)

**Kostnaður:** Øking í samlaða kravda tímakarminum á náttúrubreyt og búskaparbreyt á miðnámi.

- *Týskt sum byrjanarmál á miðnámi verður strikað.*

Tað vísir seg at vera trupult hjá miðnámsskúlunum at skipa týskundirvísingina bæði í byrjanar- og framhaldsmáli. Lutfalsliga fáir næmingar velja týskt, og tí er ofta neyðugt at leggja holdini í byrjanar- og framhaldsmáli saman. Hetta ger fortreytirnar fyri góðari fremmandamálsdidaktiskari týskundirvísing verri. Fyrimunir við at strika týskt sum byrjanarmál eru, at undirvísingin verður meira miðvís, og tað verður lættari hjá skúlunum at skipa undirvísingina. Vansar eru, at næmingar á náttúru-, búskapar- og fyrireikingarbreyt, sum ikki hava havt týskt í fólkaskúlanum, ikki kunnu velja týskt sum fremmandamál. Hesi kunnu tó framvegis velja franskt ella spanskt sum byrjanarmál.

**Atgerð:** Broyting í undirvísingarkunngerðini (Kunngerð nr. 9 frá 22. januar 2013)

**Kostnaður:** Eingin

[2] Ynskiligt er, at næmingarnir skulu kunna velja at uppstiga hetta B-stigið til A-stig, sum er førleikagevandi til víðari lestur. Skal tað bera til, er neyðugt, at fremmandamálið byrjar longu 1. árið.

## 5.2. Viðmerkingar til námsætlanir

- *Námsætlanin í donskum frá 3. floksstigi til A-stig skal dagførast, og vegleiðing skal gerast. Meira dentur skal leggjast á málið sum miðil og samskiftisamboð, eisini í grannamálunum norskum og svenskum.*

Námsætlanin í donskum er gjørd við donsku móðurmálsnámsætlanini sum fyrimynd, og líkist tí meira eini móðurmálsnámsætlan enn eini fremmandamálsnámsætlan. Undirvísingin í donskum í føroyska skúlaverkinum higartil hevur verið meira at rokna sum móðurmálsundirvísing enn sum fremmandamálsundirvísing. Næmingarnir hava eisini havt hollan málførleika í donskum, longu áðrenn teir hava møtt dansklærugreinini í skúlanum. Seinnu árini hava tó fleiri ábendingar verið um, at henda støðan er í broyting. Málførleikin hjá okkara næmingum í donskum og grannamálunum norskum og svenskum er sum heild viknað, og vit hava alt fleiri næmingar, sum ikki eru serliga stinnir í donskum og grannamálum, tá tey byrja frálæruna.

Mælt verður tí til at laga námsætlanina í donskum til eina fremmandamálsnámsætlan, soleiðis at undirvísingin meira miðvíst leggur seg eftir at menna málið sum miðil og samskiftisamboð. Í hesum høpi hevði eisini verið skilagott at skipa dansklærugreinina á miðnámi í A-, B- og C-stig og við tímatali samsvarandi øðrum fremmandamálslærugreinum, t.d. enskum.

**Atgerð:** Nám skal raðfesta dagføringina av námsætlanini í donskum.

**Kostnaður:** Sí 5.3 um námsráðgevar.

- *Námsætlanin í enskum frá 4. floksstigi til A-stig skal dagførast, og vegleiðing skal gerast. Meira dentur skal leggjast á málið sum miðil og samskiftisamboð, bæði í enskmæltum londum og í enskum sum lingua franca kring heimin.*

Námsætlanin í enskum er sera lítið broytt, síðan hon kom í gildi í 2011 fyri fólkaskúlan og í 2013 fyri miðnám. Hinvegin er støðan hjá enska málinum í Føroyum nógv broytt. Alheimsgerð, fleirmentan og tøkni gera sítt til, at okkara børn frá barnsbeini av samskifta regluliga á enskum máli. Neyðugt er tí at fáa námsætlanina dagførda við støði í støðuni hjá enskum máli í Føroyum í dag, soleiðis at okkara næmingar fáa bestu líkindi at menna enskførleikar samsvarandi krøvunum í einum alt meira altjóðagjørdum og fleirmentanarligum heimi.

**Atgerð:** Nám skal raðfesta dagføringina av námsætlanini í enskum.

**Kostnaður:** Sí 5.3 um námsráðgevar.

- *Námsætlanin í týskum skal dagførast, og vegleiðing skal gerast. Námsætlanin skal fevna frá 7. floksstigi í fólkaskúla til A-stig á miðnámi. Meira dentur skal leggjast á málið sum miðil og samskiftisamboð, herímillum skal námsætlanin lagast meira til CEFR-skipanina.*
- *Námsætlanirnar í fronskum og sponskum skulu dagførast, og vegleiðingar skulu gerast. Meira dentur skal leggjast á málini sum miðil og samskiftisamboð, herímillum skulu námsætlanirnar lagast meira til CEFR-skipanina.*

Námsætlanirnar í týskum, fronskum og sponskum eru lítið ella einki broyttar, síðan tær komu í gildi í 2011 fyri fólkaskúlan og í 2013 fyri miðnám. Við eini dagføring skulu námsætlanirnar lagast meira til CEFR-skipanina og málið sum miðil og samskiftisamboð.

**Atgerð:** Nám skal raðfesta dagføringina av námsætlanunum í týskum, fronskum og sponskum.

**Kostnaður:** Sí 5.3 um námsráðgevar.

## 5.3. Viðmerkingar til undirvísingartilfar og lærarafførleikar

- *Dagført, føroyskt undirvísingartilfar í fremmandamálunum í fólkaskúlanum skal fáast til vega.*

Í lærugreinini donskum er einki føroyskt undirvísingartilfar, og í enskum og týskum er dagført tilfar ikki tøkt á øllum stigum. Í sambandi við, at námsætlanirnar í fremmandamálum verða dagførdar, er av størsta týdningi, at undirvísingartilfarið fylgir við og samsvarar námsætlanunum. Somuleiðis eiga føroyskir skúlanæmingar at fáa føroyskt fremmandamálstilfar, sum er gjørt ella tillagað eftir fortreytunum hjá føroyskum skúlanæmingum. Fyri at fáa gongd á, verður mælt til at seta ritstjóra í tíðaravmarkað verkætlanarstarv í trý ár.

**Atgerð:** Nám skal raðfesta undirvísingartilfar í fremmandamálum á fólkaskúlaøkinum og seta ritstjóra í tíðaravmarkað verkætlanarstarv í trý ár.

**Kostnaður:** Játtanin til Nám skal økjast við uml. 600.000 kr. árliga í trý ár.

- *Dagført, føroyskt undirvísingartilfar í fremmandamálunum á miðnámi skal fáast til vega.*

Í lærugreinini donskum er einki føroyskt undirvísingartilfar, og í hinum fremmandamálunum er dagført tilfar ikki tøkt á øllum stigum. Í sambandi við, at námsætlanirnar í fremmandamálum verða dagførdar, er av størsta týdningi, at undirvísingartilfarið fylgir við og samsvarar námsætlanunum. Somuleiðis eiga føroyskir skúlanæmingar at fáa føroyskt fremmandamálstilfar, sum er gjørt ella tillagað eftir fortreytunum hjá føroyskum skúlanæmingum. Fyri at fáa gongd á, verður mælt til at seta ritstjóra í tíðaravmarkað verkætlanarstarv í trý ár.

**Atgerð:** Nám skal raðfesta undirvísingartilfar í fremmandamálum á miðnámsskúlaøkinum og seta ritstjóra í tíðaravmarkað verkætlanarstarv í trý ár.

**Kostnaður:** Játtanin til Nám skal økjast við uml. 600.000 kr. árliga í trý ár.

- *Námsráðgevi í týskum á fólkaskúlaøkinum skal setast í starv.*

Fyri at menna fremmandamálini í skúlaverkinum skulu námsráðgevar vera í starvi í Námi. Hesir skulu arbeiða við at ráðgeva lærarum og ritstjórum. Eisini skulu teir arbeiða við at dagføra námsætlanir, arbeiða við próvtøkuuppgávum og ráðgeva viðkomandi ráðum og stovnum um fremmandamál í skúlaverkinum.

Mælt verður til at skipa størvini soleiðis, at hvør fremmandamálslærugrein í fólkaskúlanum hevur námsráðgeva í 0,2 setanarbroti. Námsráðgevin skal frammanundan eisini undirvísa í fremmandamálinum í fólkaskúlanum. Nám hevur námsráðgeva í donskum og enskum, og mælt verður til eisini at seta námsráðgeva í týskum.

**Atgerð:** Nám skal seta í starv námsráðgeva í týskum á fólkaskúlaøkinum.

**Kostnaður:** Játtanin til Nám skal økjast við uml. 200.000 kr. árliga.

- *Námsráðgevar í fremmandamálum á miðnámsskúlaøkinum skulu setast í starv.*

Fyri at menna fremmandamálini í skúlaverkinum skulu námsráðgevar setast í starv í Námi. Hesir skulu arbeiða við at ráðgeva lærarum og ritstjórum. Eisini skulu teir arbeiða við at dagføra námsætlanir, arbeiða við próvtøkuuppgávum og ráðgeva viðkomandi ráðum og stovnum um fremmandamál í skúlaverkinum.

Mælt verður til at skipa størvini soleiðis, at hvør fremmandamálslærugrein á miðnámi fær námsráðgeva í 0,2 setanarbroti. Námsráðgevin skal frammanundan eisini undirvísa í fremmandamálinum á miðnámi.

Samanlagt gevur hetta eitt ársverk til námsráðgevar í teimum fimm fremmandamálunum, donskum, enskum, týskum, fronskum og sponskum á miðnámsskúlaøkinum.

**Atgerð:** Nám skal seta í starv námsráðgevar í fremmandamálum á miðnámsskúlaøkinum.

**Kostnaður:** Játtanin til Nám skal økjast við uml. 600.000 kr. árliga.

- *Skipast skal fyri skeiðum í fremmandamálsdidaktikki á fólkaskúlaøkinum.*

Skal sum mest fáast burtur úr fremmandamálsundirvísingini í fólkaskúlanum, er umráðandi, at lærarar fáa bestu fortreytir at arbeiða undir. Mælt verður tí til, at skeið í fremmandamálsdidaktikki, sum samsvara fremmandamálsnámsætlanum og undirvísingartilfari, verða raðfest. Nám skal hava námsráðgevar í fremmandamálum at skipa hesi skeiðini.

**Atgerð:** Nám skal raðfesta skeið í fremmandamálsdidaktikki á fólkaskúlaøkinum.

**Kostnaður:** Sí 5.3 um námsráðgevar.

- *Skipast skal fyri skeiðum í fremmandamálsdidaktikki á miðnámsskúlaøkinum.*

Skal sum mest fáast burtur úr fremmandamálsundirvísingini á miðnámi, er umráðandi, at lærarar fáa bestu fortreytir at arbeiða undir. Mælt verður tí til, at skeið í fremmandamálsdidaktikki, sum samsvara fremmandamálsnámsætlanum og undirvísingartilfari, verða raðfest. Nám setur í starv námsráðgevar í fremmandamálum at skipa hesi skeiðini.

**Atgerð:** Nám skal raðfesta skeið í fremmandamálsdidaktikki á miðnámsskúlaøkinum.

**Kostnaður:** Sí 5.3 um námsráðgevar.

## 5.4. Viðmerkingar til gransking og útbúgving

- *Námsvísindadeildin á Fróðskaparsetri Føroya skal hava granskingarstørv í øllum fremmandamálum, sum eru lærugreinar í føroyska fólkaskúlanum. Nýggj fulltíðar granskingarstørv skulu tí stovnast til lærugreinarnar danskt og týskt.*

Námsvísindadeildin klekir flestu lærarar, sum fáa starv í føroyska fólkaskúlanum. Umráðandi er tí, at útbúgvingum í størst møguligan mun hevur jørðildi í føroyska samfelagnum og føroyskari mentan. Starvsfólkini á námsvísindadeildini bæði granska og undirvísa lærarlesandi í ymsum lærugreinum. Tá tað kemur til fremmandamál, er tað einans ensklærugreinin, sum hevur granskara í starvi á Námsvísindadeildini. Fyri at tryggja bestu gransking og frálæru til okkara lærarlesandi verður mælt til, at Námsvísindadeildin fær játtan til at skipa føst granskingarstørv í donskum og týskum.

**Atgerð:** Námsvísindadeildin skipar føst granskingarstørv í donskum og týskum.

**Kostnaður:** Játtanin til Fróðskaparsetrið skal økjast við uml. 1.200.000 kr. árliga.

- *Á Fróðskaparsetri Føroya skal arbeiðast fram ímóti, at miðnámsskúlalærarar í fremmandamálum skulu kunnu útbúgva seg í minsta lagi á bachelorstigi í Føroyum.*

Eins og við fólkaskúlalærarum skal arbeiðast fram ímóti, at føroyskir miðnámsskúlalærarar í fremmandamálum skulu kunna nema sær útbúgving í Føroyum, sum hevur jørðildi í føroyska samfelagnum og føroyskari mentan.

**Atgerð:** Fróðskaparsetur Føroya byrjar arbeiðið at fyrireika útbúgvingar í donskum, enskum, týskum, fronskum og sponskum á bachelorstigi.

**Kostnaður:** Við tíðini skulu pengar játtast til fleiri granskingarstørv.

**Tórshavn, hin 28. oktobur 2021**

________________________________________

Hanna Ziskason Hansen, forkvinna

________________________________________

Sólvá Jónsdóttir, skrivari

________________________________________

Mortan Zachariassen

________________________________________

Tórhallur við Gil

________________________________________

Hanna Jensen

________________________________________

Kalpana Vijayavarathan